**Semja**
**millum**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**og**

**Maskinmeistarafelagið**

Omanfyri nevndu partar eru samdir um at leingja sínamillum sáttmálan til 1. juni 2020 við niðanfyri standandi broytingum:

1. Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1. juni 2018 hækkar lønin | 3,26 % |
| 1. juni 2019 hækkar lønin | 2,56 % |

2. Í § 2, stk. 3 verður talið *"1.050"* broytt til *"1100"* og *"550"* broytt til *"600"*.

3. § 7 – Yvirtíðargjald

   Eftir verandi orðing í § 7, stk. 5 verður lagt afturat: *"Tó kann hóskandi samsýning verða veitt eftir umsókn annaðhvørt sum yvirtíðargjald ella avspáking, um álagt verður óvanliga drúgt yvirtíðararbeiði í styttri tíðarskeið."*

4. § 12 - Lívstrygging/eftirlønartrygging

   Nýtt stk. 2.

   *Tey, sum hava nátt fólkapensiónsaldur, fáa ístaðin upphæddina, sum skuldi verið flutt sum eftirløn, útgoldna sum løn. Áðrenn upphæddin verður goldin, verða gjøld, sum skulu rindast samstundis sum lønin, tikin av upphæddini, soleiðis at útreiðslan hjá arbeiðsgevara verður óbroytt.*

   *Sama er galdandi fyri persónar, sum smb. § 1, skt 5 í eftirlønarlógini eru frítiknir fyri at rinda til eina føroyska eftirlønarskipan*

5. Í § 16 verður talið *"1,1%"* broytt til *"1,0%"*.

6. § 21. Gildi sáttmálans

*"1. juni 2016"* verður broytt til *"1. juni 2018"*, og *"1. juni 2018"* verður broytt til *"1. juni 2020"*.

**Tórshavn, 6. juni 2018**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Marita Rasmussen, samráðingarleiðari

**Fyri Maskinmeistarafelagið**

Ólavur Gunnarsson, formaður

Regin Olsen, næstformaður

John Højsted, nevndarlimur